Vikuskiftis Sosialurin



# Gud er komin úr kul



**- Átrúnaður fær størri og størri undirtøku kring allan heim, tí fólkið vil aftur til røturnar. Fólk hava brúk fyri onkrum at halda um. Í 20. øld vóru tað tær politisku hugsjónirnar, men hesar hvurvu í stóran mun, tá ið múrurin fall, og átrúnaðurin fyllir nú hetta tómrúmið. Hetta sigur danski politikarin Naser Khader, sum heldur lítið um mongu politikararnar, sum beinleiðis gera sær dælt av átrúnarligu vekingini.**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

Var hetta enn ein fjølmiðlahending, sum fólkakæri politikarin á bonaðu gólvunum á Christiansborg sjálvur var upphavið til?

Fleiri fólkatingslimir høvdu hug at smílast, tá teir hoyrdu, at Naser Khader fyri góðum hálvum øðrum ári síðan hevði fingið sær eina tatovering. Á arabiskum stóð nú demokrati á yvirarminum á radikala politikaranum.

Naser Khader legði einki í, um hansara samstarvsfelagir smíltust. Tað kom ikki óvart á hann. Teir vóru jú føddir við tí – demokratiinum.

Tað var hann ikki. Hann er føddur í Sýria. Har var hvørki demokrati ella skrivi- og talufrælsi. Pápanum dámdi væl at gera gjøldur burtur úr einaræðisstjórnini. Tí gav hann soninum, Naser, greið boð, áðrenn hann fór skúla, at hann mátti ikki endurtaka tað, sum varð sagt heima við hús, tí í flokkinum hjá Naser vóru fleiri næmingar, har foreldrini vóru partar av trygdartænastuni hjá einaræðisharranum, Hafez Assad.

Lívsverkið hjá Naser Khader er at stríðast móti ekstremismu og fyri demokrati. Sama, um tað er í Miðeystri ella í Føroyum, vissar hann okkum henda dagin, Sosialurin hittir hann á skrivstovu síni á Christiansborg.

Hansara stríð kostar. Viðgongdu muslimarnir í Danmark hava kallað hann fyri eina rottu, og seinasta hálva annað árið hevur hann verið undir neyvum eftirliti alt samdøgrið av tveimum PET-løgreglumonnum.

- Eg eri komin til "the point of no return". Eg kann snøgt sagt ikki spola aftur, sigur Naser Khader.

### Aftra seg

– Nú fer óivað onkur føroyingur at siga, hvat skal ein muslimur fortelja okkum, hvat vit skulu gera. Á sama hátt sum eg eri kritiskur mótvegis Saudi Arabia, so vil eg eisini vera atfinningarsamur mótvegis Føroyum. Eg haldi, at tað er heilt ótrúligt, at føroyskar kvinnur ikki hava somu grundleggjandi rættindi sum danskar kvinnur- til eitt nú fosturtøku. Tú kanst heilt einfalt heldur ikki bera teg soleiðis at, sum fleiri føroyingar hava gjørt mótvegis teimum samkyndu, sum m. a. hava verið nevnd kynsvillingar.

Hann sær álvarsamur út. Bulmikli politikarin, sum hevur hann eina fortíð á danska landsliðnum sum glímari, tykist vera óróligur og rullar skjúrtuermuna upp. Hann hugsar seg um eina løtu, fær sær ein slurk av kaffi og heldur fram:

– Grundgevingina, at hatta eru innanhýsis føroysk mál, sum danskir politikarar ikki skulu leggja seg útí, góðtaki eg ikki. Grundleggjandi mannarættindi eru ikki nakað innanhýsis mál. Danski løgmálaráðharrin átti at kravt, at føroyska lóggávuverkið verður nútímansgjørt, tá vit tosa um grundleggjandi mannarættindi og persónsrættindi. Mínar royndir siga mær, at danskir politikarar aftra seg, tá tað ræður um viðurskifti í Føroyum, heldur Naser Khader.

Naser Khader tykist vera ein strongdur maður. Aðru hvørja løtu hyggur hann eftir urinum. Meðan hann situr og ruggar á stólinum, fer hann at greiða frá, at hann hevur trupulleikar við at geva eitt neyvt svar, hví danskir politikarar aftra seg við leggja seg út í føroysk viðurskifti.

– Eg havi bara búð í Danmark í góð 30 ár, so eg kenni ikki øll søguligu viðurskiftini millum Danmark og Føroyar. Mínar royndir eru bara, at tað tykist, sum ávís øki eru friðhalgað.

Eins og mongu ymsu bólkarnir í Miðeystri, so kunnu føroyingar altíð semjast um at finnast at Danmark og donskum politikarum, sama um teir eru samdir í gerandisdegnum. Eg veit ikki um tað stavar frá tíðini, tá Danmark var hjálandaveldi, men danskir politikarar seta altíð autopilotin ígongd, tá teir úttala seg um føroysk viðurskifti, har somu setningar og formuleringar verða nýttar. Henda tørv havi eg ongantíð kent á mær, tá eg havi úttalað meg um Føroyar, sigur hann við einum skálkasmíli.

> ***Islam:***
> *Islam kann brúkast til alt. Leita og tú skalt finna. Eg eri demokratur og eri fyri sameining og sátti og semju. Átrúnaður er eitt privatmál, sum onnur ikki skulu leggja seg útí. Eg eri ein sonevndur kulturellur muslimur, har eg síggi islam sum eina mentan - meira enn nakað annað.*

### Islam og demokrati

Tað er kortini ikki í Føroyum, at Naser Khader nýtir sínar orku í gerandisdegnum. Seinastu árini hava hansara atfinningar verið serliga vendar móti víðgongdu arabisku londunum og víðgongdu muslimunum í Danmark. Hansara stóra mál og ynski er at gera islam meira demokratiskt.

## FAKTA

**Navn:** Naser Khader
**Føddur:** 1.juli 1963 í Damaskus
**Útbúgving:** Cand. polit
**Starv:** Fólkatingslimur fyri Radikala Vinstra flokkin síðan 2001